# ...fiskavirkjunum hart spent



## Miðal árslønin í fiskiídnaðinum økt 20,9% í fýra ár

**Talið av ársverkum í fiskiídnaðinum fylgir sum heild vøkstrinum í ráfiskanøgdini í árunum 2000-2002, men í 2003 og 2004 eru fleiri ársverk fyri hvørt kilo av ráfiski**

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rasmussen & Weihe hava eisini gjørt eitt yvirlit yvir ársverkini í fiskiídnaðinum á landi á teimum virkjum, sum eru við í greiningini.

Hagtølini siga, at ársverkini árini 2000-2004 eru minkaði við 4,8% - og árini 2003-2004 er minkingin 10,4%.

- Talvan vísir, at ársverkini í 2004 eru 57 færri enn í 2000. Talið minkar nakað í 2003 – og tað minkar nógv í 2004. Hinvegin øktist talið av ársverkum støðugt árini 2000-2002.

Grannskoðarafelagið vísir á, at miðal árslønin er økt øll árini, og størsti vøksturin var í 2002, og í 2004 er staðfestur ein vøkstur upp á 5,5%.

- Samanlagt er miðal árslønin hækkað 20,9% hesi 4 árini.

### Ráfiskur

Nøgdin av ráfiski fyri hvørt ársverk er á sama støði árini, 2000-2002, men lutfalsliga ráfiskanøgdin fyri hvørt ársverk minkar árini 2002-2004.

- Hetta merkir, at talið av ársverkum sum heild fylgir vøkstrinum í ráfiskanøgdini í árunum 2000-2002, men í 2003 og 2004 eru fleiri ársverk fyri hvørt kilo av ráfiski. Hetta er galdandi fyri at kalla øll fiskavirkini, sigur felagið.

Rasmussen og Weihe vísa á, at úrslitið fyri "óvanligt" fyri hvørt ársverk hevur verið rættiliga ymiskt hesi fimm árini, men hetta er minkað markant í 2003 og 2004 í mun til 2001 og 2002.



hava einki virksemi havt í 2004.

- Roknskapirnir hjá luttakandi feløgunum eru uppsettir ymiskt, og hetta kann føra við sær, at feilir kunnu vera í samanlagda roknskapinum fyri øll feløgini, men hetta hevur helst ikki so stóran týdning, heldur grannskoðarafelagið.

Víst verður á, at í mun til seinastu roknskapargreining, eru Palm Seafood og Suðurís ikki við fyri 2004. Fiskavirkini, Vestís, FarIta og Suðurís eru tikin við í greiningina frá og við roknskaparárinum, tá ið raksturin av hesum virkjum byrjaði.

Hesi 10 feløgini umboða í 2004 tilsamans 86,8% av fiskaframleiðsluni í Føroyum.

### Hørð kapping

Eins og í greiningini av fiskiskipaflotanum, leggja Rasmussen & Weihe dent á, at roknskapargreiningin av fiskiídnaðinum skal geva lesarum møguleika at gera sínar egnu niðurstøður.

- Tí hava vit ikki eina eintýdda niðurstøðu um gongdina. Vit kunnu tó staðfesta, at virkini sum heild hava verið fyri eini stórari framgongd árini frá 2000-2001. Í 2002 vendi framgongdin til eina lítla afturgongd, og í 2003 hevur afturgongdin verið so stór, at samlaði raksturin hjá virkjunum gav eitt lítið hall – og í 2004 høvdu virkini stórt hall.

Tað tykist, sum um kappingin um rávøruna við útlandið er munandi harðnað í 2002 og serliga í 2003 og 2004.

- Tølini benda á, at virðisøkingin samanborið við útreiðsluvøksturin til lønir og aðrar útreiðslur ikki er nóg stór, og tí eru virkini ikki kappingarfør í nóg stóran mun, tá ið ræður um at kappast við útlendskar keyparar um rávøruna.

### Spent gjaldføri

Rasmussen & Weihe vísa eisini til ársfrágreiðingina hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag fyri 2004.

- Í ársfrágreiðingini verður víst á, at tað serliga eru fýra faktorar, sum ávirka kappingarførið hjá føroysku flakavinnuni. Lønarvøksturin hevur verið stórur tey seinastu árini, virðið á amerikanska dollaranum hevur verið rættiliga lágt, og støðdin á fiskinum, serliga upsanum, er fallin munandi seinastu árini.

Ráfiskakeyparafelagið metir tí, at framtíðarútlitini tískil benda á eina afturgongd, um ikki eydnast virkjunum at virka fiskaúrdráttir, sum skapa størri avkast – ella, at marknaðarfyritreytirnar broytast, samstundis sum útreiðsluvøksturin verður tálmaður.

- Virkini eru sum heild rímiliga væl konsolideraði, og mugu tí metast at vera væl fyri til at ganga eini afturgongd á møti, tó við einstøkum undantøkum.

Víst verður á, at nógvar íløgur eru figgjaðar yvir raksturin, samstundis sum fígging av goymslum og skuldarum setir alsamt størri krøv til rakstrarfígging.

- Tí kann roknast við, at gjaldførið hjá mongum virkjum er hart spent, heldur grannskoðarafelagið.